


**Nr. 15** ***20. juli 2025*** **85. árg.**

# JESUS HJÁLPIR!

*Moses Hansen*

Eg hugsi, at tey flestu høvdu kallað Elsu eina fitta, løgna konu – sera og ógvuliga gudiliga. Men sannleikin er, at hon var eitt Guds-Menniskja.

Eg stóð og samlaði 40 fólk á flogvøllinum í Kastrup. Vit vóru á veg til Ísraels. Alt í einum stóð ein fitt, lítil kona framman fyri mær og segði: „Hey Moses! Eg gleði meg til, at vit saman skulu ferðast runt í Ísrael!“

Elsa hevði ikki boðað frá, at hon ætlaði sær við á hesi ferðini, men hon hevði fingið greiði á, nær vit skuldu flúgva. Nú stóð hon fitt og smílandi við einari hondtasku og tveimum plastposum – og einum ferðaseðli til sama flogfar sum vit.

Eg greiddi henni frá, at eg hevði ikki bílagt nakað kamar til hennara – og eg royndi at fáa hana at sláa av at koma við. Hon svaraði við tveimum orðum, sum eg kom at hoyra mangar ferðir tær næstu tvær vikurnar. Orðini vóru: JESUS HJÁLPIR!

Tað eydnaðist eisini at finna eitt kamar á teimum fýra hotellunum, har vit skuldu gista. Men Elsa var ein sjálvstøðug kona, og hon gjørdi ymiskt á ferðini, sum tú av trygdarávum avgjørt ikki gert í Ísrael.

Tá ið eg greiddi henni frá, at hatta ikki var so klókt at gera, smíltist Elsa so fitt og svaraði: „Íðan Moses – JESUS HJÁLPIR! Tað mást tú vita!“

Tað var heilt galið tann síðsta dagin, tí tá hvarv Elsa. Eg noyddist at lýsa eftir henni hjá politinum. Seint á kvøldi kom ein hernaðarjeppur til hotellið við Elsu á baksetrinum – saman við einum sekki. Í honum vóru steinar, plantur og fløskur við

arabiskum og hebraiskum tekstum, sum hon gjøgnum dagin hevði samlað sær saman.

Hon var móð, men smílið var enn har. Og tá ið eg segði, at vit høvdu verið ógvuliga bangin um hana, ljóðaðu orðini: „Íðan Moses – JESUS HJÁLPIR! Tað mást tú vita!“

Tá ið vit koyrdu til flogvøllin dagin eftir, var passið hjá henni burturi. Men Elsa segði: „JESUS HJÁLPIR!“

Og tað gjørdi Hann. Ein tollari fann passið í einum pappkassa, har Elsa hevði steinar, plantur og fløskur, sum tú ikki hevði loyvi at flyta út úr landinum. Men hon fekk alt við.

TÍ JESUS HJÁLPTI! Og tað ger Hann enn fyri øll Guds-Menniskju – uttan mun til, hvat ið onnur meina um okkum. Hasi bæði orðini koma ofta fram fyri meg, tá ið eg standi í einari torførari støðu.

Takk Elsa, av tí at tú komst við henda túrin. Vit síggjast í Himli.

*Effie Campbell* umsetti.

# Bókin uttan orð

Ein smágenta í skúlanum gav mær eina pinkalítla bók. Bókin hevði eingi orð, men hvør síða hevði sín serstaka lit, sum segði sína søgu.

Fyrsta síðan er svørt, og ímyndar hon allar syndir okkara. Vit synda dagliga í orði, tanka og verki.

Onnur síðan er reyð. Hon ímyndar Jesu blóð, sum vaskar okkum rein, um vit angra og biðja Jesus fyrigeva okkum.

Triðja síðan er hvít. Nú hava vit fingið fyrigeving og eru hvítari enn snjó, sum tað stendur í Sálmi 51,9.

Fjórða síðan er gylt, gull. Hon ímyndar Himmalin, har gøturnar eru av gulli.

Perman er grøn. Hon ímyndar vøkstur. Grasið og trøini eru grøn, og meiningin er, at vit skulu vaksa í okkara kristna lívi. Tað gera vit, tá ið vit lesa í Bíbliuni, Guds orði, og ganga í kirkju og á møti.

*Effie Campbell.*

# Deyðahjálp – Lívshjálp

Í Hálandi bjóða tey aktiva deyðahjálp til fólk, sum stríðast við demens, umframt aðrar álvarsligar sjúkur. Hetta tilboð fáa eisini børn heilt niður í 12 ára aldur.

Hvat sigur Gud? Hann sigur í Prædikaranum 8,8: „Eingin maður hevur ræði á vindinum, so at hann kann byrgja fyri vindinum, og **eingin maður ræður yvir deyðadegnum.“**

Í aktivari deyðahjálp siga tey, at deyðin er ein VINUR. Men Gud sigur hitt øvugta í 1. Kor. 15,26: „Hin síðsti FÍGGINDIN, sum týndur verður, er DEYÐIN.“ Í 5. Mós. 30,19 sigur Gud: „Eg havi lagt fram fyri tykkum lívið og deyðan. **Veljið nú lívið.“**

Guds svar til henda spurning er aktiv lívshjálp! Tað merkir, at menniskju finna Jesus – at familjur finna Jesus – so at vit standa øksl móti øksl frá fostri til grøv, har vit tá kunnu siga: „Farvæl, vit síggjast hinumegin!“

*Effie Campbell* umsetti.

# Snævurskygdur

Verðin heldur, at tey Jesus-trúgvandi eru so snævurskygd, tá ið ræður um frelsuna og æviga lívið. Tey halda, at vit hugsa ov „smalt“.

Jesus sigur í Jóhs. 14,6: „**Eg eri vegurin og sannleikin og lívið. Eingin** kemur til Faðirin uttan við **mær**!“ Her er talan um **Jesus**.

Í Áps. 4,12: „**Ikki er frelsa í nøkrum øðrum**; tí at **ikki** er heldur nakað annað **navn** undir himlinum, givið millum manna, sum vit skulu verða frelstir við.“ Tað navnið er **Jesus**.

Í 1. Jóh. 5,11–13: „Gud hevur givið okkum ævigt lív, og **hetta lívið er í syni hansara**. Tann, sum **hevur sonin, hevur lívið**; tann, sum **ikki** hevur **Guds son**, hevur **ikki lívið**. Hetta havi eg skrivað til tykkara, fyri at **tit skulu vita, at tit hava ævigt lív.“** Sonur Guds er **Jesus**!

*Effie Campbell* umsetti.

# Hvar kann eg loyva mær at fara?

Ein drongur var júst konfirmeraður, og tað ja, hann hevði givið Jesusi, meinti hann av øllum hjarta sínum. Hann hevði trúgvandi foreldur, og tey frøddust um avgerð hansara. Men stutt eftir ringdu vinmenninir og bóðu hann koma oman á hotellið, har skuldi vera dansiveitsla í vikuskiftinum. „Tað fer at verða soo stuttligt,“ søgdu teir. Tað var lætt hjá honum at siga nei í telefonini, men verri var, tá tveir vinmenn komu heim til hansara og royndu at fáa hann at ganga frá sínum.

„Eg má tosa við pápa um hetta,“ svaraði hann. „Tú ert so vaksin nú, at tú sjálvur mást taka avgerðirnar í lívi tínum. Men eg hugsi, at tú innast inni veitst, hvat ið tú eigur at velja,“ svaraði pápin. „Eg vil biðja teg lesa hesi bæði versini, áðrenn tú tekur eina avgerð,“ segði pápin. Drongurin fór upp á kamarið og las:

*Tag Jesus med, hvorhen du længes,*
*da bliver du så let i sind,*
*og hvor din Frelser ude stænges,*
*der skal du ikke selv gå ind.*
*Tag Jesus med på dine veje,*
*da kan du være dem bekendt,*
*og bed ham våge ved dit leje,*
*når dagens travle værk er endt.*

*Tag Jesus med, hvorhen du farer,*
*da kan du aldrig fare vild,*
*da vogter på dig engleskarer,*
*om verden lukker øjet til.*
*Og hælder dagen, o, da kommer*
*din Frelser selv i dødens sted*
*for til en evig, evig sommer*
*at tage dig, en synder, med.*

*Adolf Langsted.*

Tá visti drongurin, hvat ið hann skuldi svara vinmonnunum. Vit skulu ikki leita freistingina upp. Minst til Evu. Hon ætlaði sær ikki at gera nakað skeivt, hon ætlaði sær bara at hyggja. Men fert tú bara at hyggja, so ert tú longu gliðin helvtina niður eftir hellingini, tí freistingin er sterk sum ein magnet, og tú ert lítla jarnpettið. Fert tú ov nær, so vups, so hongur tú fastur.

*Effie Campbell.*

---

„Um bara aldurdómurin hevði verið sterkur og ungdómurin klókur,“ segði Martin Luther einaferð.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 16** ***3. august 2025*** **85. árg.**

# Liv ikki í fortíðini

*„... eg vil vaka yvir orði mínum til tess at evna tað.“ Jer. 1,12.*

Um vit skulu liva eitt sigrandi lív, mugu vit byrja dagin við takkargerð, Guds orði, og vit mugu grunda á Guds lyfti. – Vit hugsa 70.000 tankar hvønn dag, og 90% av hesum tonkum eru teir somu, sum vit hugsaðu í gjár. Um vit ikki hugsavna okkum um Harran, tá ið dagurin byrjar, so fara tankarnir úr fortíðini at fylla sinn okkara.

Brádliga fara hendingar úr fortíðini, annaðhvørt tað eru sálarligir stoytir, umstøður, persónar ella onnur ting, at fylla okkara sinn og ávirka okkara kenslulív negativt. Vit missa gleðina og friðin, av tí at vit liva í fortíðini og ikki í nútíðini ella framtíðini.

Mong trúgvandi hava torført við at hugsavna seg og vera still. Tey byrja dagin við at hyggja í fartelefonina, kanna teldupostin ella lurta eftir tíðindum. Ella tey práta við sínar næstringar, og tá fellur prátið ofta á trupulleikar og negativ ting.

Sjálvur fari eg beinanvegin at grunda á Guds orð, og so fari eg undir at takka honum fyri lyfti hansara. Tá tømist sinni mítt fyri tankar og kenslur úr fortíðini, og tað verður víðopið fyri Guds orði og tonkum. Eg havi lært av jødunum, sum biðja við øllum kroppi sínum. Tí biði eg og andi djúpt og røri armarnar. Tað ger, at eg fái hugsavna meg um Guds lyfti við anda, sál og kroppi.

Í Sálmi 131,2–3 stendur: „Nei, eg sál mína havi fingið at vera stilla og kvirra, eins og avvant barn hjá móður síni, eins og avvant barn er sál mín hjá mær. Ísrael, Harranum bíða frá nú og um allar ævir!“

*Effie Campbell* umsetti.

# Guds orð verða ongantíð gomul ella óakutuel

*„Eg vil vaka yvir orði mínum til tess at evna tað.“ Jer. 1,12.*

Tá ið eg hoyri tey mongu orð í loftmiðlunum og aðrar staðir, tá verði eg so takksamur fyri lyftið í Hebr. 13,8: „JESUS KRISTUS ER Í GJÁR OG Í DAG HIN SAMI OG UM ALLAR ÆVIR.“

Orð, sum Harrin talaði fyri fleiri túsund árum síðani, eru ikki vorðin gomul ella óaktuel. Tey skulu ikki lagast eftir tíðini. Lyftir, sum blivu givin Ísrael og jødunum fyri fleiri túsund árum síðani ERU ENN Í GILDI!

Lyftir, sum eru givin tær og mær – ERU ENN Í GILDI!

Tí knýtt til lyftið, at Ísrael skuldi endurreisast, boðaði Ezekiel fyri 2.600 árum síðani hesi orð frá Harranum: „EG, HARRIN, HAVI TALAÐ OG MAN ÚTINNA TAÐ.“ (Ezekiel 36,36).

Hesi fáu orð lýsa Guds lyndi, eitt lyndi, sum ongantíð broytist. So ger tær sjálvum ta tænastu, at tú letur tað fjallið av orðum frá politikarum, serfrøðingum og nevndum fara inn gjøgnum annað oyrað og út aftur gjøgnum hitt. Tú skalt heldur lesa ORÐIÐ, BÍBLIUNA, sum tú kanst líta á, tí TAÐ FER AT HENDA, SUM HANN HEVUR SAGT!

*Effie Campbell* umsetti.

# Kloddar, spjarrar og skeytar

Onkuntíð kanst tú hoyra fólk tosa forhánisliga um tey heimleysu og kalla tey fyri ein klodda. Hatta er ikki rætt at gera, tey skulu ikki verða vanærd og eyðmýkt. Vit vita ikki, hvussu lívið er farið við teimum. Tey eru eisini skapt í Guds mynd, og sami prísur er goldin fyri tey sum fyri øll onnur. Jesus rindaði prísin á Golgata, og tann prísurin er eins fyri okkum øll.

Tað stendur nakað um spjarrar og skeytar í Bíbliuni, og teir lógu inni í sjálvari kongshøllini, og Gud brúkti teir stórliga. Stykkið stendur í Jeremia 38, 6–13.

Søgan er henda: Nakrir menn tóku Jeremia og lótu hann síga niður í ein brunn í bondum. Einki vatn var í brunninum, bara runa, og Jeremia sakk niður í hesa rununa.

Ebed-Melek, sum var í hirði kongs, frætti hetta, og hann fór inn til kongin og greiddi frá støðuni, sum Jeremia var í,

og at nú fór hann at doyggja í hungri í brunninum. Kongur bað Ebed-Melek taka 30 mans við sær og fáa Jeremia upp úr brunninum. Ebed-Melek so gjørdi, hann tók menninar við sær og fór heim í kongshøllina og inn í eitt goymslurúm, og haðani tók hann skeytar og spjarrar av gomlum klæðum og læt síga tað í bondum niður til Jeremia. So rópti hann: „Legg spjarrarnar undir hendurnar um bandið." Tað gjørdi Jeremia. Síðani drógu teir hann við bondunum upp úr brunninum, og Jeremia sat nú aftur í vaktargarðinum.

Hetta er ein góð mynd uppá, hvussu Gud kann brúka tað, onnur kalla fyri kloddar. Hann kann brúka tað stórliga í síni tænastu. Her vóru teir uppií at bjarga profetinum, Jeremia, og gev tær far um, at teir høvdu sítt tilhald uppi á sjálvari kongsborgini.

*Effie Campbell.*

# Krossarplankin og aðrir timburstokkar

Krossurin er miðpunktið í frelsusøguni. Um krossurin verður tikin út úr Bíbliuni, er eingin loysn upp á syndatrupulleikan. Jesus doyði ein pínufullan deyða á krossinum, og har rindaði hann fyri allar heimsins syndir. Kortini eru tað ikki øll, sum blíva frelst, tí tey taka ikki ímóti hesu dýru gávu, sum verður rætt teimum.

Gud skapti trøini í síni tíð, og tað er løgið at hugsa sær, at nógv ár seinni kom sonur hansara at hanga á einum træi. Vit lesa um Jesu líðingarsøgu í Nýggja Testamenti, men í Gamla Testamenti standa ið hvussu er tvær frásagnir, sum vísa okkum, at Gud brúkar trø at hjálpa menniskjum.

Fyrra frásøgnin stendur í 2. Mós. 15,23. Fólkið gekk frá Reyðahavinum og inn í oyðimørkina Sjúr, og har reikaðu tey um í tríggjar dagar uttan at finna vatn. Tá komu tey til Mara; men tey kundu ikki drekka av vatninum, tí tað var beiskt, og harav navnið Mara. Tá grenjaði fólkið inn á Móses, sum rópti til Harran. Harrin vísti honum á eitt træ og bað hann blaka tað í vatnið, og tá varð tað drekkandi.

Seinna frásøgnin stendur í 2. Kong. 6,5. Einaferð komu profetasynirnir til Elisa og søgdu, at hølið, har teir fingu undirvísing frá honum, var alt ov trongt. Teir komu við tí uppskotinum, at allir skuldu fara oman til Jordan og taka hvør

sín timburstokk og byggja eitt nýtt høli har. Elisa helt, at tað var eitt gott hugskot, men teir vildu hava hann at koma við sær. Hann fór so við teimum, og teir fóru undir at fella trøini. Men ein teirra var óheppin. Sum hann feldi eitt træ, reyk øksarhøvdið av og datt niður í hesa djúpu ánna. Maðurin rópti við, tí hann átti ikki øksina sjálvur, hann hevði lænt hana. Elisa segði tá við hann: „Sig mær akkurát, hvar ið tú misti tað." So skar Elisa eina grein av einum træi og blakaði hana út júst har. Tá flotnaði øksarhøvdið upp har, og maðurin kundi taka tað.

Paulus sigur, at Kristus sendi hann út at prædika evangeliið – ikki við klókum og vísum orðum, men so einfalt og greitt sum gjørligt – fyri at krossur Krists skuldi ikki missa kraft sína. Gud sigur jú eisini: „Eg skal oyða vísdóm hinna vísu, og vit hinna vitigu skal Eg gera til einkis." 1. Kor. 1,17. 19.

*Effie Campbell.*

# Lýdni

„Hvat hann so sigur við tykkum, tað skulu tit gera!" Hetta vóru orðini, Maria segði við tænararnar í brúdleypinum í Kána.

Lýdni móti Gudi í øllum hansara leiðbeiningum er til allar tíðir treytin fyri, at signingin kann vera úrslit av lívi okkara. Trúgv er ikki eitt verk ella okkurt bragd, men at vera lýðin og gera, sum Jesus sigur. Ger tað, og tú skalt sanna, at soleiðis er tað.

Jesus segði við lærusveinarnar: „Setið gørnini út høgru megin bátin." Tað gjørdu teir so og fingu nógvan fisk.

Hann segði: „Takið steinin burtur!" Og tey, sum stóðu so sorgarbundin har, sóu Lázarus koma út úr grøvini.

Við Pætur segði Jesus: „Kom!" Og Pætur kundi enntá ganga á vatninum yvir til Jesusar. Hetta er vert at minnast til: „Farið og gerið tað, sum hann sigur við tykkum!"

*Effie Campbell* umsetti.

---

Ræ ttvísi lyftir eina tjóð upp. *e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74